**Skjal ZC**

**From:** Føroya KFUK Skótar <kfukscout@gmail.com>
**Sent:** Friday, December 14, 2018 12:34 AM
**To:** Løgting <logting@logting.fo>
**Cc:** Ruth Vang <ruthv@logting.fo>; Bárður á Steig Nielsen <bardurn@logting.fo>; Helena Dam á Neystabø <helenan@logting.fo>; Kristin Michelsen <kristinm@logting.fo>; Pauli Trond Petersen <paulip@logting.fo>; Jacob Vestergaard <jacobv@logting.fo>; Bill Justinussen <billj@logting.fo>; Høgni Joensen <hognij@logting.fo>
**Subject:** Viðmerking til Fíggjarnevndina

Áheitan frá Føroya KFUK-skótum

Í fíggjarlógini undir punkt 7.24.1.13 í samband við undirkonto 07, Skótarørsla. Vit gleðast um økta stuðulin, men halda, at ein misskiljing er komin í, tá tað stendur, at økingin í játtanini á 750.000 kr. skal markast til Skótadepilin á Selatrað, ið er ogn hjá KFUM Skótunum í Føroyum.

Stuðulin til Føroya Skótaráð, ið er samstarvsráð fyri skótasamskipanirnar í Føroyum, eigur at vera latin uttan serliga marking, soleiðis at umsitingin av eykastuðlinum til rakstur verður tikin upp til demokratiska viðgerð, sambært reglugerð hjá Føroya Skótaráð og á tann hátt koma øllum trimum samskipanunum og harvið øllum skótum í Føroyum til góðar.

Vit vilja mæla til, at økingin, sum verður latin Føroya Skótaráð, ikki verður oyramerkt til rakstur av Skótadeplinum á Selatrað, men heldur at Føroya Skótaráð fær mandat til at avgera, hvussu hesin rakstrarstuðulin skal býtast og nýtast. Søguliga hevur stuðulin til skótarørslurnar verið latin til Føroya Skótaráð at umsita. Tilgongdin hevur verið demokratisk og avgerðir tiknar í felag. KFUM Skótarnir í Føroyum mynda saman við Føroya Skótasambandi og Føroya KFUK-skótunum Føroya Skótaráð og hava sostatt javnbjóðis ávirkan á, hvussu peningurin verður disponeraður.

vegna Føroya KFUK-skótar

Inga Foldbo Hjallnafoss
forkvinna
tel.:  212424

Fía Lindenskov
nevndarlimur
tel.:  299549

Finn okkum á Facebook: Føroya KFUK-skótar